# Tilfar um útboð av ráðgevaratænastu at standa fyri trivnaðarátaki á Gjaldstovuni

# Innihald

Tilfar um útboð av ráðgevaratænastu at standa fyri trivnaðarátaki á Gjaldstovuni ........ 1

Ráðgevaratænasta til Gjaldstovuna ........ 3

Uppgáva ........ 3

Støðulýsing ........ 3

Veiting ........ 3

Successfyritreytir ........ 4

Tíðarætlan ........ 4

Fyriskipa uppgávuna ........ 4

Hvat skal vera í tilboðnum ........ 5

Meta um tilboðið ........ 5

Tíðarfreistir ........ 6

Fáa tillutað sáttmála ........ 6

# Ráðgevaratænasta til Gjaldstovuna

Gjaldstovan biðir um tilboð at fremja ráðgevaratænastu at standa fyri trivnaðarátaki á Gjaldstovuni.

# Uppgáva

Talan er um ráðgevaratænastu, sum er at standa fyri einum trivnaðarátaki, sum m.a. er at gera eina trivnaðarkanning við uppfylgingum.

Vit vilja hava eina mynd av trivnaðinum á Gjaldstovuni. Aftur at tí skulu verða settar í verk tilgongdir at taka støðu til tær avbjóðingar, sum verða staðfestar.

Sum eitt tað týdningarmesta, skal tað verða fylgt upp á trivnaðarátakið.

Hóast ein partur av tilgongdini er ein trivnaðarkanning, skal dentur verða lagdur á, at tað er tann organisatoriska tilgongdin, sum vit leggja dent á. Vit leggja eisini dent á tað er arbeiðið, sum er eftir kanningina, sum t.d. at tosa nágreiniligari við deildirnar, gera handlingsætlanir og at fylgja upp.

# Støðulýsing

Organisatiónin Gjaldstovan er nógv broytt. Hon er vaksin seinastu tíggju árini, partar av organisatiónini hava livað undir nógvum trýsti í longri tíð, og tað hevur í seinastuni verið stór útskifting av starvsfólki. Støðan og avbjóðingarnar kunnu tí vera sera ymisk frá øki til øki.

Trivnaðarátakið er fyrsta stigið at hava trivnaðarkanningar sum fastan endurtakandi tátt.

Á Gjaldstovuni eru gott 70 fólk, sum arbeiða á tíggju deildum.

# Veiting

Vit rokna við, at tá ið vit eru komin til enda við uppgávuni á vári í 2025, at:

- Tað er gjørd ein skipað trivnaðarkanning fyri allar deildirnar, og tað er gjørd ein skipað frágreiðing um hetta. Vit hugsa at tilgongdin er dialoggrundað.
- Øll eru komin til orðanna
- Tað eru gjørdar handlingsætlanir fyri tær stóru avbjóðingarnar
- Uppfylgingar eru gjørdar fyri handlingsætlanirnar

# Successfyritreytir

Handlingsætlanirnar eru settar í verk.

# Tíðarætlan

Uppskot um leist kundi verið sum niðanfyri. Tilboðsveitari er vælkomin at gera onnur uppskot um leist.

**September:**

Avtala verður undirskrivað við tann, ið vinnur útboðið og farið verður undir fyrireikingarnar til trivnaðarkanningina.

**Oktober:**

Trivnaðarkanning verður gjørd fyri Gjaldstovuna, og vit skulu síggja úrslitið fyri hvørt øki. Vit hugsa, at hesin parturin verður so vítt gjørligt tann sami fyri øll økini fyri at kunna samanbera.

**November og desember:**

Úrslitið av kanning verður lagt fram fyri allari Gjaldstovuni á einum yvirskipaðum stigi.

Framløga fyri deildunum, har áherðsla verður lagt á tað, sum er serligt fyri hvørja eind.

Leiða tilgongdina at gera handlingsætlanir fyri Gjaldstovuna og fyri deildirnar og gera tíðarætlanir.

**Februar og apríl 2025:**

Uppfylging og at rætta kós.

Í apríl verður úrslitið endalig mett og tilgongdin verður eftirmett saman við øllum ábyrgdarpersónum

Tað er týdningarmikið at staðfesta, at tíðarætlanin fylgir nøkulunda tí, sum er hugsað omanfyri.

# Fyriskipa uppgávuna

Vit rokna við, at viðkomandi, sum fær uppgávuna, stendur fyri øllum arbeiðinum at samskipa, framleiða tilfar og fylgja upp á tíðarætlan.

Tann, sum ger uppgávuna, skal vísa til leiðslubólkin á Gjaldstovuni og skal saman við leiðslubólkinum fyrireika arbeiðið.

Í tí praktiska arbeiðinum kemur tú at arbeiða saman við leiðaranum fyri fyrisitingina.

Vit leggja dent á dialogin, sum er rættur móti tí einkultu deildini og persóninum.

# Hvat skal vera í tilboðnum

Uppskot til leist fyri átakið

Uppskot til spurningar (Spurnablað) til kanningina

Prís fyri uppgávuna. Vit vilja hava fastan prís fyri uppgávuna

Meting av samlaðu tíðarnýtsluni greinað á hvønn tátt í tíðarætlanini, sum er skotin upp omanfyri

Vit skulu hava navn, nøvn á teimum, sum skulu fremja uppgávuna

Listi yvir líknandi framd arbeiði og úrslit

CV hjá ráðgevanum

# Meta um tilboðið

Tað er umráðandi at tryggja góðskuna, tá ið mett verður um innkomnu tilboðini. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis: 50% tilboðsprísur og 50% góðska. Útrokningin fer fram á hendan hátt:

Góðska: .

- Tað er umráðandi, at viðkomandi, sum gevur tilboð, hevur royndir við slíkum uppgávum. Her verður serliga lagdur dentur á royndir við tilgongdini frá kanning til handlingsætlan.
- Sjálvt tilboðið, her hugsa vit leist og tilgongd. Her undir eina framløgu. Og tó, vit velja bestu tilboðini at bjóða at gera framløgu
- Ástøði innan økið

Út frá eini samlaðari meting – út frá royndum og tilvísingum – verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal.

Tilboðsprísur: Tilboðið við lægsta samlaða prísi fær 50 stig. Sama er við góðsku.

Hini tilboðini fáa stig eftir lutfallinum við lægsta tilboðið.

Um prístilboðið er lægri enn 200 túsund kr. verður tilboðið sett til 200 túsund kr. í mun til aðrar prísir.

# Tíðarfreistir

Tilboð skulu sendast til: gjaldstovan@gjaldstovan.fo í seinasta lagi 18. september í 2024, kl. 23:59. Tilboð kunnu ikki sendast inn á annan hátt.

Spurningar til innihaldið í hesum tilfari kunnu verða settir fram til tann 4. september.

Spurningar kunnu verða settir til Leif@gjaldstovan.fo. Øll svar kunnu síggjast á keypsportal.fo í seinasta lagi 10. september.

Miðað verður eftir, at sáttmálin er undirskrivaður í seinasta lagi 1. oktober í 2024.

# Fáa tillutað sáttmála

Tann fær tilboðið, sum hevur fíggjarliga skynsamasta tilboðið.

Gjaldstovan treytar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði.

Útreiðslur, sum tilboðsgevari hevur í sambandi við hetta útboðið, heldur tilboðsgevari sjálvur.